# KUNNING FRÁ NEVNDINI

# UM

# FÍGGJARGONGDINA SÍĐANI ÁRSAĐALFUNDIN

## November 2009

### KUNNING frá STÝRINUM

**um**

**Fíggjargongdina síðani ársfundin hjá umboðsnevndini**
**(jbr. viðtøkurnar, § 4, stk. 13 b).**

## Formæli og niðurstøður

Eftir viðtøkunum hjá SEV skal stýrið lata umboðsnevndini eina frágreiðing um búskapargongdina síðani seinasta ársfund.

Umframt gongdina síðani ársfundin er valt niðanfyri at greiða frá gongdini alt árið higartil og at meta um væntaða úrslitið við árslok.

Niðanfyri eru víst rakstrartøl sambært bókhaldinum fyri tíðarskeiðið januar – oktober 2008, og hvussu nógv prosent av ársfíggjarætlanini eru brúkt við endan av oktober.
Bókingarnar eru periodiseraðar, men ikki grannskoðaðar.
Harafturat skal fyrivarni takast fyri ársuppgerð av elkundunum sambært avlestrar, sum verða gjørdir í desember og sum umfata umleið tveir triðingar av elnýtsluni. Eisini skal roknast við møguligum eftirbókingum.

Sum greitt er frá niðanfyri, verður rakstrarúrslitið í 2008 kanska áleið tað sama ella eitt sindur verri, enn ásett í rakstrarætlanini. Sambært bókhaldstølini fyri fyrstu 10 mánaðirnar av árinum er avlopið fyri tað tíðarskeiðið uml. 5 mió. kr., men skal hettar tal takast við fyrivarni, jbr. viðmerkingarnar. Eftir fíggjarætlanini varð roknað við einum halli upp á 1,6 mió. kr. Tað er fyrst og fremst elsølan, sum hevur verið størri enn væntað sambært bókhaldið, men endaliga úrslitið fyri alt árið verður helst lutfalsliga nakað lægri, enn bókingarnar fyrstu 10 mánaðirnir vísa. Hinvegin verða oljuútreiðslurnar lutfalsliga lægri restina av árinum.

Samanumtikið kann sigast, at hóast fyribils roknskapurin fyrstu 10 mánaðirnar av árinum vísir eitt avlop uppá 5 mió kr, so kann við ávísum fyrivarnum sigast, at endaliga ársúrslitið verður helst eitt minni hall,  soleiðis sum rakstrarætlanin fyri 2008 eisini vísir.

**Rakstrartøl 2008 – 2009 (1.000 kr.)**

| | Roknskapur 2008 | Fíggjarætlan 01– 01-31-12 2009 | Bókað 01.01-31.10. 2009 | Brúkt í % av ætlan | Tillagað ætlan fyri 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| Streymgjald | 255.881 | 267.079 | 197.603 | 74 | 256.143 |
| Fast gjald | 15.970 | 15.900 | 12.155 | 76 | 16.169 |
| Íbindingargjald | 3.254 | 2.000 | 1.667 | 83 | 2.000 |
| Aðrar inntøkur | 1.755 | 2.000 | 781 | 61 | 1.755 |
| **Inntøkur tils.** | **276.860** | **287.000** | **212.206** | **74** | **276.067** |
| Keyp av streymi | 2.185 | 2.900 | 1.847 | 64 | 2.700 |
| Olja tilsamans | 119.923 | 97.300 | 56.381 | 58 | 75.000 |
| Tilfar excl. anleggsprojekt | 76.831 | 63.360 | 47.167 | 74 | 61.410 |
| Lønir excl. anleggsprojekt | 57.168 | 58.600 | 45.776 | 78 | 61.250 |
| **Rakstrarútr. tils.** | **256.107** | **222.160** | **-151.171** | **68** | **200.360** |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **20.753** | **64.840** | **61.034** | **94** | 75.707 |
| Renta og tilíkt | 3.533 | 6.900 | -3.605 | 52 | 5.000 |
| **Úrslit áðrenn avskr.** | **17.220** | **57.940** | **57.429** | **99** | **70.707** |
| Anleggsavskrivingar | 48.357 | -50.000 | -37.499 | 75 | 55.500 |
| **Úrslit** | **- 31.137** | **7.940** | **19.930** | | **15.207** |

## Elframleiðsla og nýtsla

Í 2008 var elframleiðslan 275,8,4 mió. kWh, harav vatnorka 95,9 mió. kWh ella 34,8% av framleiðsluni og vindur 13 mió. kWh ella 4,7% av framleiðsluni.

Náttúran broytist frá ár til ár og við henni eisini framleiðslan úr vatni og vindi. Broytingarnar eru bæði upp og niður frá tíð til aðra. Bæði vatn- og vindorkuframleiðslan var undir meðal í 2008.

Í 2009 var vatnorkuframleiðslan uml. 3,6 mió. kWh minni fyrstu 10 mánaðirnir samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Í sama tíðarskeiði var vindorkuframleiðslan uml. 2,2 mió. kWh størri.

T.v.s., at fyrstu 10 mánaðirnir í ár er framleiðslan frá varandi orkukeldum samanlagt uml. 1,4 mió. kWh minni enn sama tíðarskeið í fjør. Hesir 1,4 mió. kWh gera saman við óbroyttu nýtslu, at termiska framleiðslan var samsvarandi størri 10 teir fyrstu mánaðirnir.

## Inntøkurnar í 2009

Tað eru tríggir ymiskir faktorar, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV, sum er søla av elmegi.
Hesir tríggir faktorarnir eru:

- Elprísbroytingar
- Broytingar í elnýtsluni
- Forskjótingar ímillum ymiskar kundaprísbólkar

Seinastu árini er inntøkan vaksin næstan uttan undantak ár eftir ár orsakað av vaksandi elnýtslu. Prísirnir fyri hvønn kundabólk sær hava verið óbroyttir fram til 1. januar 2008, tá allir elprísirnir hækkaðu 10 oyru/kWh.Vøksturin í elnýtsluni til ídnaðarprís hevur verið størstur við teirri fylgju, at meðal elprísurin hevur verið fallandi.
Avgjørt varð at hækka elprísirnar 4 oyr/kWh frá 1. januar 2009, men fekk SEV ikki loyvi frá avvarandi myndugleikum til hækkingina. Tí verða inntøkurnar einar 10 mió. kr. lægri enn ætlað.
Nýtsluvøksturin er steðgaður í fjør, og framleiðslutølini síðani august í ár benda á eitt fall í nýtsluni.

Um hettar verður gongdin restina av árinum, er ilt at meta um, men í løgdu fíggjarætlanini fyri 20010 er roknað við, at ongin vøkstur verður frá 2008 til 2009 og heldur ongin frá 2009 til 2010.
Umleið tveir triðingar av søluni verður gjørd upp við avlestri hjá kundunum einaferð um árið, og verður tá staðfest, hvat sølan til tann einstaka kundan hevur verið. Avlisið verður í desember á hvørjum ári.

Bókaða inntøkan upp á 212,2 mió. kr. tann 30. september kann ikki beinleiðis umroknast til eina fulla ársinntøku, av tí, at bóking av inntøkunum fellur ikki javnt mánað fyri mánað.

Út frá nevndu manglandi gókenning av elpríshækking frá 1. januar 2009, uppgerðum higartil, bókaðum íbindingargjøldum í framleiðslutølum o.a. verður mett, at samlaða intøkan verður helst fyri alt árið 2009 áleið 276 mió. kr.

## **<u>Útreiðslurnar</u>**

### Olja

Tað, sum serstakliga ávirkar útreiðslurnar til oljukeyp, er prísbroytingar og nýtslubroytingar umframt sveiggj í vatn- og vindorkuframleiðsluni frá ár til ár. Harafturat merkjast broytingar í býtinum av framleiðsluni ímillum tung- og gassolju.

<u>Oljuprísirnir</u> eru tengdir at prísnoteringini á oljumarknaðinum og USD-kursinum.
Prísirnir á teirri tungolju, sum SEV brúkar, fylgir marknaðarprísinum, sum hevur verið ógvuliga óstøðugur og hevur havt lyndi at hækka seinastu fýra árini, jbr. yvirlitið niðan-fyri yvir prísnoteringarnar. Tá fíggjarætlanini fyri 2009 varð gjørd seinasta heyst, varð roknað við einum meðal innkeypsprísi hjá SEV upp á 2.555,- DKK/tons. Oljuprísirnir vóru við ársbyrjan niðanfyri hendan prís, men fóru síðani móti sumri munandi uppum. Út á heystið 2008 fullu prísirnir aftur, og hava higartil í ár hildið sær niðanfyri prísin, sum brúktur varð í fíggjarætlanini. Samanumtikið verður roknað við, at um prísirnir fara at halda sær á tí støði, teir vóru við byrjan av november 2009, verða samlaðu oljuútreiðslurnar einar 22 mió. kr. lægri enn ásett í fíggjarætlanini.

Niðanfyri er ein mynd og ein talva, sum vísa prísgongdina á tungolju (1% fuel, FOB, NWE), meðal fyri hvønn mánað frá 1. januar 1999 til 6. november 2009.

# Oljuprísir, tungolja 1999 - 2009

1 % fuel, fob/NWE, meðal "high" og "low", $ / tons, tó frá 01.01.2002 bert "high":

| | Ár: | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mánaður:** | **1999** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** |
| **Januar** | 70,1 | 133,8 | 128,0 | 115,6 | 196,3 | 148,6 | 180,3 | 305,0 | 226,2 | 471,1 | 240,2 |
| **Februar** | 55,1 | 145,6 | 122,5 | 100,2 | 182,8 | 139,8 | 187,4 | 319,5 | 244,4 | 469,1 | 241,0 |
| **Mars** | 62,0 | 145,4 | 121,4 | 119,7 | 174,4 | 146,9 | 226,1 | 307,5 | 264,0 | 501,5 | 245,9 |
| **Apríl** | 70,3 | 124,3 | 124,4 | 133,0 | 136,4 | 156,2 | 247,9 | 321,0 | 301,1 | 542,5 | 278,0 |
| **Mai** | 77,0 | 135,7 | 125,4 | 132,4 | 141,4 | 178,3 | 232,8 | 318,8 | 318,3 | 596,2 | 331,8 |
| **Juni** | 79,1 | 160,1 | 116,3 | 133,7 | 161,0 | 171,0 | 249,5 | 308,6 | 335,9 | 661,3 | 381,6 |
| **Juli** | 92,1 | 149,5 | 117,3 | 135,0 | 176,2 | 172,4 | 264,7 | 321,3 | 374,9 | 728,0 | 375,9 |
| **August** | 111,9 | 134,7 | 117,7 | 138,3 | 177,0 | 166,7 | 282,3 | 326,7 | 361,7 | 630,5 | 429,6 |
| **September** | 114,7 | 162,5 | 125,0 | 161,7 | 152,0 | 163,1 | 317,6 | 270,5 | 382,6 | 537,5 | 410,9 |
| **Oktober** | 123,0 | 176,0 | 102,8 | 159,6 | 159,0 | 185,6 | 303,1 | 258,1 | 418,5 | 393,6 | 432,0 |
| **November** | 119,0 | 162,1 | 89,6 | 145,0 | 154,8 | 168,9 | 279,0 | 256,8 | 487,2 | 284,4 | 461,8 (01.-13.) |
| **Desember** | 121,2 | 145,1 | 103,6 | 151,4 | 143,6 | 161,4 | 293,3 | 253,3 | 476,7 | 229,6 | |
| ***Meðal alt árið*** | *91,3* | *147,9* | *116,2* | *135,4* | 162,9 | 163,2 | 255,3 | 297,2 | 349,3 | 503,8 | |

| **ÁR:** | **Prísur USD/tons** |
|---|---|
| **31-01-1999** | **70,1** |
| **28-02-1999** | **55,1** |



| | |
|---|---|
| 31-03-1999 | 62,0 |
| 30-04-1999 | 70,3 |
| 31-05-1999 | 77,0 |
| 30-06-1999 | 79,1 |
| 31-07-1999 | 92,1 |
| 31-08-1999 | 111,9 |
| 30-09-1999 | 114,7 |
| 31-10-1999 | 123,0 |
| 30-11-1999 | 119,0 |
| 31-12-1999 | 121,2 |
| 31-01-2000 | 133,8 |
| 29-02-2000 | 145,6 |
| 31-03-2000 | 145,4 |
| 30-04-2000 | 124,3 |
| 31-05-2000 | 135,7 |
| 30-06-2000 | 160,1 |
| 31-07-2000 | 149,5 |
| 31-08-2000 | 134,7 |
| 30-09-2000 | 162,5 |
| 31-10-2000 | 176,0 |
| 30-11-2000 | 162,1 |
| 31-12-2000 | 145,1 |

**Prísútrokning 23.10.2009:**

| | |
|---|---|
| Notering 1.-16. okt. 09 | 413,71 |
| Meðal ískoyti | 40,50 |
| USD-kursur 22.10.09 | 4,96 |
| RHM35-prísur, DKK/tons: | 2254,02 |

| | |
|---|---|
| 31-01-2001 | 128,0 |
| 28-02-2001 | 122,5 |
| 31-03-2001 | 121,4 |
| 30-04-2001 | 124,4 |
| 31-05-2001 | 125,4 |
| 30-06-2001 | 116,3 |
| 31-07-2001 | 117,3 |
| 31-08-2001 | 117,7 |
| 30-09-2001 | 125,0 |
| 31-10-2001 | 102,8 |
| 30-11-2001 | 89,6 |
| 31-12-2001 | 103,6 |
| 31-01-2002 | 115,6 |
| 28-02-2002 | 100,2 |
| 31-03-2002 | 119,7 |
| 30-04-2002 | 133,0 |
| 31-05-2002 | 132,4 |
| 30-06-2002 | 133,7 |
| 31-07-2002 | 135,0 |
| 31-08-2002 | 138,3 |
| 30-09-2002 | 161,7 |

| | |
|---|---|
| **Prísur sb. fíggjarætlan:** | **2555,00** |

**Prísútrokning 27.10.2009:**

| | |
|---|---|
| Notering 1.-23. okt. 09 | 425,29 |
| Meðal ískoyti | 40,50 |
| USD-kursur 27.10.09 | 5,00 |
| RHM35-prísur, DKK/tons: | 2.331 |

**Prísútrokning 27.10.2009:**

| | |
|---|---|
| Notering bert 23. okt. 09 | 459,25 |
| Meðal ískoyti | 40,50 |
| USD-kursur 27.10.09 | 5,00 |
| RHM35-prísur, DKK/tons: | 2.501 |

**Prísútrokning 29.10.2009:**

| | |
|---|---|
| Notering bert 28. okt. 09 | 443,50 |
| Meðal ískoyti | 40,50 |
| USD-kursur 29.10.09 | 5,03 |
| RHM35-prísur, DKK/tons: | 2.436 |

| | |
|---|---|
| 31-10-2002 | 159,6 |
| 30-11-2002 | 145,0 |
| 31-12-2002 | 151,4 |
| 31-01-2003 | 196,3 |
| 28-02-2003 | 182,8 |
| 31-03-2003 | 174,4 |
| 30-04-2003 | 136,4 |
| 31-05-2003 | 141,4 |
| 30-06-2003 | 161,0 |
| 31-07-2003 | 176,2 |
| 31-08-2003 | 177,0 |

## Prísútrokning 29.10.2009:

| | |
|---|---|
| Notering 1.-28. okt. 09 | 429,50 |
| Meðal ískoyti | 40,50 |
| USD-kursur 29.10.09 | 5,03 |
| RHM35-prísur, DKK/tons: | 2.366 |

Budget-prísur 2010= meðal notering 1. - 28. okt. 2009+8%

USD-kursur= kurs pr. 29.10.2009

| | | |
|---|---|---|
| Hettar gevur ein HFO-prís uppá | 2.555 | DKK/TONS |
| Go.-prísurin settur = prísin 29.10.2009?8 %= | 4.979 | DKK/M3 |

**Prísur á tungolju, USD/tons, FOB, NWE**

**Ár:**

| Mánaður: | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 70,1 | 133,8 | 128,0 | 115,6 | 196,3 | 148,6 | 180,3 | 305,0 | 226,2 | 471,1 | |
| Februar | 55,1 | 145,6 | 122,5 | 100,2 | 182,8 | 139,8 | 187,4 | 319,5 | 244,4 | 469,1 | |
| Mars | 62,0 | 145,4 | 121,4 | 119,7 | 174,4 | 146,9 | 226,1 | 307,5 | 264,0 | 501,5 | |
| Apríl | 70,3 | 124,3 | 124,4 | 133,0 | 136,4 | 156,2 | 247,9 | 321,0 | 301,1 | 542,5 | |
| Mai | 77,0 | 135,7 | 125,4 | 132,4 | 141,4 | 178,3 | 232,8 | 318,8 | 318,3 | 596,2 | |
| Juni | 79,1 | 160,1 | 116,3 | 133,7 | 161,0 | 171,0 | 249,5 | 308,6 | 335,9 | 661,3 | |
| Juli | 92,1 | 149,5 | 117,3 | 135,0 | 176,2 | 172,4 | 264,7 | 321,3 | 374,9 | 728,0 | |
| August | 111,9 | 134,7 | 117,7 | 138,3 | 177,0 | 166,7 | 282,3 | 326,7 | 361,7 | 630,5 | |
| September | 114,7 | 162,5 | 125,0 | 161,7 | 152,0 | 163,1 | 317,6 | 270,5 | 382,6 | 537,5 | |
| Oktober | 123,0 | 176,0 | 102,8 | 159,6 | 159,0 | 185,6 | 303,1 | 258,1 | 418,5 | 393,6 | |
| November | 119,0 | 162,1 | 89,6 | 145,0 | 154,8 | 168,9 | 279,0 | 256,8 | 487,2 | | |
| Desember | 121,2 | 145,1 | 103,6 | 151,4 | 143,6 | 161,4 | 293,3 | 253,3 | 476,7 | | |
| **Meðal alt árið** | **91,3** | **147,9** | **116,2** | **135,4** | **162,9** | **163,2** | **255,3** | **297,2** | **349,3** | | |

Viðmerkingar: Talið fyri november 2009 er meðaltalið fyrstu 6 dagarnar.

**Aðrar rakstrarútreiðslur**

Útreiðslurnar til rakstur av elverkunum (fyriuttan oljuútreiðslur) og til býtisvirkir og fyrisiting íroknað ymiskar felagsútreiðslur hava samanlagt verið fyrstu 10 mánaðirnar av árinum áleið tað, ið roknað er við í rakstraræltlanini. Meðan lønarútreiðslurnar eru eitt sindur hægri, so sær út til sambært bókhaldstølini, at heldur minni er brúkt til tilfar og tænastuveitingar.
Ein ávísur seinleiki er í bóking av hesum m.a. orsakað av, at rokningar kunnu vera seinkaðar í mun til veitingartíðina. Væntast kann tó alíkavæl, at rakstraræltlanin á hesum øki fer at halda.

## Renta

Roknað verður við, at nettorentuútreiðslurnar verða nakað lægri, enn ásett í rakstraræltlanini fyri 2008. Hettar kemst serstakliga av, at orsakað av betri rakstrarúrsliti og minni íløgum, enn ætlað, hevur tøki peningurin gjøgnum árið verið størri enn væntað, og hevur rentuinntøkan tí eisini verið størri.
Hækkandi rentustøðið hevur eisini munað nakað til rentuinntøkurnar.
Núverandi langtíðarlánini hjá SEV hava fasta rentu í 2008.

## Avskrivingar

Avskrivingartíðin fyri tey ymisku rakstrargøgnini hjá SEV hevur verið óbroytt í mong ár. M.a. verða dieselmotorar og býtisvirkir avskrivað yvir uml. 15 ár og vatnorkuverk yvir 20 ár. Hettar svarar nøkurlunda til avdráttirnir av teimum lánum, ið upprunaliga vórðu til fígging av íløgunum.

Oftani hevur verið at hoyrt, bæði í fjølmiðlunum og í umboðsnevndini hjá SEV, at avskrivingartíðin kundi verið longd við samsvarandi lægri elprísum.

Sum grannskoðari felagsins á várfundi umboðsnevndarinnar í 2007 so beinrakið greiddi frá, so er veruleikin viðvíkjandi elprísunum ein annar.

Aftaná stóru íløgurnar í 80-árunum var skuldin hjá SEV væl omanfyri 700 mió. kr. við árslok 1990.
Við árslok 2007 var langfreistaða skuldin komin niður á 123,8 mió. kr.

Í 1990 vóru avskrivingarnar 80 mió. kr. og rentuútreiðslurnar 72 mió. kr. Sama ár rindaði ídnaðurin 1,24 kr/kWh.

Høvdu elprísirnir frá 1990 einans verið prístalsviðgjørdir, hevði elprísurin hjá ídnaðinum verið uml. 2,09 kr./kWh og hjá húsarhaldinum uml. 2,30 kr./kWh + MVG í dag.

Í 2007 vóru avskrivingarnar 49,5 mió. kr. og nettorentan 2,3 mió. kr., meðan ídnaðurin rindaði 0,64 kr/kWh**.** Hevði avdráttartíðin og avskrivingartíðin verið longri ígjøgnum 90-árini, hevði avskrivingargrundarlagið og eisini rentuútreiðslan verið munandi størri í dag, enn hon nú er.
Í 2007 vórðu avskrivingarnar munandi lægri enn árið fyri, nettupp orsakað av 20 ára avskrivingartíðini fyri fyrsta byggistig av Eiðisverkinum, sum varð sett í rakstur í 1987, og sum í 2006 var liðugt avskrivað.

Samráðingarnar í heyst við Fjarskiftiseftirlitið um ásetingarnar, sum skulu setast í gildi sambært elveitingarlógina, hava givið okkum vónir um, at forstáilsi er fyri hesum viðurskiftum soleiðis, at virðini, ið avskrivast skulu, verða uppskrivað í trá við veruligu virðini, samstundis sum avskrivingartíðirnar verða longdar.

**Íløgur, lántøka og likviditetur**

Sambært upprunaligu íløguætlanini fyri 2008 varð roknað við íløgum fyri í alt 114,9 mió. kr.
Nú, ið árið er farið at halla, kann staðfestast, at íløgurnar í árinum verða munandi minni, ella helst ikki meira enn tilsamans einar 70 mió. kr.

Tað eru ymisk viðurskifti, sum hava gjørt, at íløgurnar gjørdust munandi minni enn ætlað. 8 mió. kr. vórðu upprunaliga settar av til alduorku. Ymisk viðurskifti hava gjørt, at onki er brúkt higartil, og bert ein minni upphædd væntast brúkt til alduorku. Heldur ikki verða meira enn einar 20 av teimum 35 mió. kr. sum ætlanin varð at brúka til Eiði II vatnorkuútbyggingina, brúktar. Hettar kemst m.a. av, at SEV enn ikki hevur fingið neyðug myndugleikaloyvi til sunnara part av Eiði II. Annars verður roknað við sum heild, at heldur minni enn ætlað verður brúkt til íløgur í býtisvirkir og framleiðsluverk.

Samstundis sum íløgumálini í 2008 sum nevnt ikki verða rokkin, verður roknað við, at gjaldførið við árslok verður einar 35 mió. kr. og lánibyrðan av føstu lánunum einar 105 mió. kr. Høvdu íløgurnar verið hægri, varð gjaldførið samsvarandi minni.

Viðtøkubroytingarnar, sum samtyktar eru at galda frá 1. januar 2009, áseta, at veð-haldsskyldurnar hjá kommununum falla burtur við undantaki av veðhaldi fyri skyldum yvirfyri starvsfólkunum.

Virknaðurin av hesum er, at SEV verður skattskyldugt, og at neyðugt verður at fáa aðra trygd fyri bæði verandi og komandi lánifígging. Verandi lániveitarar vilja hava veð í ognum hjá SEV.

Tað er ikki gjørligt í løtuni at siga neyvt, í hvønn mun møguleikarnir hjá SEV at láni-fíggja komandi íløgur verða skerdir av viðtøkubroytingunum.

Ivi kann eisini vera um, í hvønn mun stóru broytingarnar, sum hava verið í seinastuni í viðurskiftunum á peningamarknaðinum, ávirka fíggingarmøguleikarnar.

Sum støðan er í dag verður rátt til at hava neyðuga fígging upp á pláss, áðrenn bindandi avtalur verða gjørdar um størri íløgur.

Tórshavn, tann 21. november 2008

Stýrið fyri SEV